# Landssjúkrahúsið merkir oljuprísin

**Landssjúkrahúsið roknar við at brúka eina hálva millión krónur meira til olju enn vanligt, men lagt er upp fyri eini ávísari hækking í fíggjarætlanini**



*– Vit hava roynt at lagt upp fyri hækkandi oljuprísum, men tað kann verða, at vit ikki hava lagt nóg mikið upp fyri tí. Tað fara síðstu mánaðirnar av árinum at vísa, sigur sjúkrahússtjórin Poul Geert Hansen*

OLJUPRÍSUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Landssjúkrahúsið er størsta almenna arbeiðsplássið í landinum, og har brúka tey nógva olju. Nú oljuprísurin er nógv hækkaður, merkist tað eisini á sjúkrahúsinum í høvuðsstaðnum.

– Vit brenna nógva olju, og nú prísurin er hækkaður, koma vit at brúka eina hálva millión meira enn vanligt til oljuna. Men vit hava roynt at lagt upp fyri hesum í fíggjarætlanini hjá okkum, sigur Poul Geert Hansen, sum er stjóri á Landssjúkrahúsinum.

### Kunnu fara upp um

Tað eru avsettar 3,4 milliónir krónur til oljunýtsluna á Landssjúkrahúsinum, og um hendan upphæddin fer at halda, veldst um oljuprísin restina av árinum.

– Verður oljuprísurin verðandi høgur og kanska hækkar, so kunnu vit enda einar 100 ella 200.000 krónur omanfyri avsettu upphæddina. Fellur oljuprísurin hinvegin, so er nóg mikið sett av, sigur Poul Geert Hansen.

– Vit hava roynt at lagt upp fyri hækkandi oljuprísum, men tað kann verða, at vit ikki hava lagt nóg mikið upp fyri tí. Tað fara síðstu mánaðirnar av árinum at vísa, sigur sjúkrahússtjórin.



# Starvsfólk
TIL BURGER KING Í SMS

## Aftaná skúlatíð

Søkt verður eftir fólki M/K í aldrinum 16-25 ár til at arbeiða aftaná skúlatíð - at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar tær væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og liggja millum kl. 16.00 og 24.00. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir, og eftir hetta kanst tú gerast eitt av álitisstarvsfólkum okkara.
Vit gleða okkum til at hoyra frá tær...

Send umsóknina til:
Burger King, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.
ella far inn á sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal

BURGER KING

STARVSLÝSING

# Skrivstovufólk

Fyri eitt av skrivstovufólkum okkara á starvsfólkadeildini í barsilsfarloyvi verður søkt eftir avloysara at byrja sum skjótast.

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um, í samstarvi við deildarleiðaran og onnur skrivstovufólk á deildini, at røkja ymiskar skrivstovuuppgávur, so sum brævaskifti, telefon, kunning, journal, herundir nýggj journalskipan, sum er í umbúnað at innføra og aðrar meira vanligar skrivstovuuppgávur. Fyri rætta fólkið er talan um eitt starv við spennandi avbjóðingum, og sum gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving innan skrivstovuyrkið og helst royndir innan omanfyri nevndu arbeiðsøki.
Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, hevur góð samstarvsevni, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult. Góður kunnleiki til tær edv-skipanir, ið vanliga verða nýttar á skrivstovum, er ein treyt.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda Landsverki, Postboks 78, 110 Tórshavn og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 26. sept. 2005. Merkið brævbjálvan "Skrivstovufólk".

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Levi Hentze, tel 311 333, fartel 540 811, lh@lv.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land